

Mynd: NTNU

# Færri ungdómar leita til kolvetnisútbúgvingar

**Jógvan Hugo Gardar**

24.04.2015 - 08:45

Oljan.fo

Tey sum í vár gerast liðug við sína miðnámsútbúgving hava nú sent umsóknir til teir skúlarnar sum tey ynskja at ganga á, nú tey skulu velja leiðna víðari. Í Noregi hava útbúgvingar sum kunnu brúkast innan olju- og gassvinnuna verið millum best umtóktu, men tað var áðrenn oljuprísurin fór at lække.

Ein kanning av hvørjar útbúgvingar sum hava áhuga vísir at kolvetnisútbúgvingarnar fáa munandi færri næmingar til heystar.

Ungdómarnir søkja til fleiri útbúgvingar samstundis, og seta so í eitt yvirlit hvørja útbúgving tey helst vilja inn á.Tøkniliga setrið, NTNU, í Tróndheimi fekk í 2014 286 umsóknir sum fyrstaval til sítt kolvetnisfak. Í ár hava bara 77 sett hesa útbúgvingina ovasta á listan - tað svarar til eina afturgongd uppá 73 prosent, skrivar tíðindastovan NTB.

Berit Kjeldstad, rektari á NTNU, sigur at afturgongd sær ógvislig út, tí tey høvdu metnógv sum søktu í 2014. Tey hava 60 pláss til hesa útbúgvingina, so tað verður møguligt at fylla øll plássini.

Kjeldstad sigur at hon vónar at ungdómarnir skilja at hetta er eitt øki sum kemur at hava stóran týdning eisini í framtíðini, og leggur afturat at hon ikki ivast í at tey sum fara undir hesa útbúgving nú, tey fáa ikki trupulleikar við at fáa starv.

Gongdin sum NTNU nú sær, er tann sama sum onnur setur síggja. Í bergen er afturgongdin til kolvetnisfakini 65,5 prosent og 64 prosent í Tromsø. Í oljuhøvuðsstaðnum Stavanger er talið á teimum sum ynskja at royna at fáa sær útbúgving innan olju- og gassøkið minkað við 47,4 prosentum.